# Vágbingur leiðari og eigari á stórum fiskavirki í Seattle



*Eyðfinn her saman við familjuni í heiminum í Seattle. Fv. Konan Ulla og børnini Jamie, Kristopher og Michael. Myndin varð tikin í 1998, tá føroyingar vitjaðu á veg til Alaska at síggja oljukeldurnar har*

*Mynd Jan Müller*



*Eyðfinn Tausen avmyndaður uttanfyri barnaheimið í Vági. Vágsbygd í baksýni. Ikki minnir myndin nógv um Seattle, har húsini røkka til skýggja - hjá okkum eru tað heldur fjøllini, ið randa sjónarringin*



*Nýggi bygningurin hjá Select fish*



*Eyðun Andreassen frá Fróðskaparsetrinum og Jóannes Dalsgaard frá Mentamálastýrinum vóru í 1998 saman við øðrum føroyingum á kunningarferð í Alaska. Á leiðini heimaftur varð høvi hjá teimum at vitja á fiskavirkinum hjá vágbinginum Eyðuni Tausen. Her tveir vælhýrdir havnamenn í Seattle*

*Mynd Jan Müller*

**Eyðfinn Tausen fór í 1975 til New York at starvast og seinni fór hann til Alaska. Eyðfinn tókst við ymiskt næstu árini, til hann í byrjaði í eini fyritøku í 1997. Í dag er hann sjálvur annar eigari av Select Fish og á kortinum, ið hann letur viðskiftafólki, stendur starvsheitið general manager**

SUMMARGESTUR
*Dagfinn Olsen*
*Myndir: Jan Müller/ Dagfinn Olsen*

Jóansøka er farin framvið og í eini hugnaligari stovu í Vági situr ein vágbingur, sum vitjar heimstaðin og mammuna í eina viku árliga. Hetta fasta ferðamynstur hevur hann havt síðani 1994. Eitt sindur ferðatroyttur er hann kanska eftir longu ferðina úr Seattle, men blíður og prátingarsamur.

Eyðfinn Tausen er navnið og á kortinum, ið hann gevur viðskiftafólki, stendur starsvheitið general manager. Eisini stendur virkisnavnið: Select Fish - Distributor of Quality Seafood. Og tað er júst fisk og og virking og útbreiðsla av fiski, ið talan er um. Og eisini góðsku, moral og etikk, sum eru viðurskifti, sum hava nógv meira at siga úti í heimi, enn tað ofta tykist her hjá okkum.

Men hesa søguna venda vit aftur til um eina løtu. Hvussu bar tað til, at Eyðfinn í dag ikki traðkar somu tún, sum tá hann traðkaði sínar barnaskógvar, men er leiðari á fiskavirki í stórbýnum Seattle?

## Til USA

Tað var í 1975, at Eyðfinn, sum í dag er 50 ára gamal, fór til USA at starvast fyri uttanríkisministeriið í New York á konsulátinum har. Hann var tá liðugur at lesa í Danmark og hevði verið heima aftur eitt skifti. Hetta tókst hann við í tvey ár. Tá gekk sáttmálin út. Sonur Hákun Djurhuus, fyrrv. løgmann, arbeiddi tá sum generalkonsul har. Í felag funnu teir útav at leingja starvstíðina. Seinni fór Eyðfinn til Alaska. Hetta var í 1978.

Hann starvaðist sum sølumaður fyri Baader og seldi maskinur frá 1979 til 85. Hesa tíðina fann hann sær eisini gentu og giftist.

Frá 1985 til 89 starvaðist hann hjá samtakinum Alaska Trawler. Hann var project manager. Í 1990 til 1997 hevði Eyðfinn eitt virki, sjálvur annar, ið var eitt handilsvirki.

- Í Alaska fáa teir nógvan flatfisk, ið fer burtur. Eg

*Framhald á síðu 16*

